# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## Landsliðskempa sum málverji

Óli Johannesen vardi málið hjá TB, sum spældi oddadyst í Sørvági leygardagin. Fyrrverandi landsliðskempan hevur ikki spælt fótbólt seinastu tvey árini, men Ivan Stojkovic, sum hevur verið málverji hjá tvørámonnum í ár, var leikbannaður hesaferð. Jón Johannesen, venjari hjá TB, sendi tí boð eftir yngra beiggjanum. Úrslitið í Sørvági var 2-2. Milan Pejcic javnaði fyri heimaliðið við beinleiðis frísparki, og myndamaður okkara fekk mynd av Óla Johannesen í leysari luft og í royndini at verja fyri skotinum. Óli Johannesen er skrásettur fyri 79 landsdystir.



**Holst hevur helst byrjað frammanfyri miðlinjuna, tá dysturin varð bríkslaður í gongd, tí so skjótur er hann ikki**

TROELS BECH, VENJARI HJÁ SILKEBORG, UM SKJÓTASTA MÁLIÐ Í DONSKUM FÓTBÓLTI

**Tað verða ikki bara føroyingar, men fleiri ítróttarfeløg í Evropa, sum fara at brúka kanningarúrslitini**

MAGNI MOHR UM KANNINGINA, SUM HANN FER AT GERA Í QATAR

**Vit hava betur uppiborið, tað er einki at tosa um**

HENNING G. JOENSEN, FC SUÐUROY, UM JAVNLEIKIN MÓTI B71

# VIÐMERKJARIN:
# – Vel Jákup Mikkelsen

**FÓTBÓLTUR** Kári Reynheim, fyrrverandi landsliðsleikari, metir, at Brian Kerr velir rætt, um Jákup Mikkelsen stendur í føroyska málinum í landsdystunum móti Slovenia og Norður Írlandi



*Kári Reynheim*

Uni Holm Johannesen

40 ára gamli Jákup Mikkelsen boðaði í farnu viku frá, at hann er tøkur, um Brian Kerr, landsliðsvenjari, vil hava hann at standa í málinum í komandi landsdystunum.

Gunnar Nielsen er skaddur næstu fýra vikurnar, og tí skal landsliðsvenjarin finna annan málverja.

Kári Reynheim heitir á Brian Kerr um at velja Jákup Mikkelsen.

***Hví tað?***

– Hann gevur liðnum eina ávísan tryggleika, tí hann hevur drúgvar royndir á landsliðnum. Jákup prógvaði aftur í gjár, at hann er best skikkaður, so sjálvandi skal hann standa í málinum. Málverjin er eitt sera týdningarmikið pláss á landsliðnum, tí hann er ofta undir støðugum trýsti. Jákup hevur roynt tað fleiri ferðir, og tað tænir liðnum best, at hann spælir.

***Jákup er givin á landsliðnum. Er tað ikki eitt stórt misálit á Tórð Thomsen og Meinhardt Joensen, sum hava verið eykamálverjar á landsliðnum seinastu árini?***

– Tað eru úrslitini sum telja í undankappingardystum. Landsliðsvenjarin, Fótbóltssambandið og føroyingar hugsa um úrslitini. Jákup Mikkelsen er best skikkaður sum landsliðsmálverji í løtuni, og besta liðið skal sjálvsagt spæla.

***Jákup Mikkelsen er ein fyribils loysn, og hann fer væntandi ikki at spæla fleiri dystir. Nær skulu aðrir landsliðsmálverjar so vísa sítt virði í landsliðshøpi?***

– Tað er í venjingardystum. Jákup Mikkelsen er betri enn Tórður Thomsen og Meinhardt Joensen í løtuni, og tí skal hann verja málið í dystunum móti Slovenia og Norður Írlandi.

*uni@sosialurin.fo*

# Klumman:
# Sjálvandi brúka vit tann besta!

Rólant Waag Dam

Fótbóltsspælið er soleiðis háttað, at tað liðið, sum ger flest mál, hevur vunnið dystin. Tað ræður um at verja egið mál og at skora í hinum endanum. Megnar tú tað á fullgóðan hátt, so eru stigini tíni.

Føroyska landsliðið hevur ongantíð skotið nógv mál. Hinvegin hevur ágangurin á føroyska málið mangan verið øgiligur. Tískil er plássið millum stengurnar tað mest umráðandi plássið á føroyska fótbóltslandsliðnum. Lykilin til føroysk stig – eitt so væl sum fleiri – stendur og fellur við avrikinum hjá málverjanum.

Nú Gunnar Nielsen ikki er tøkur vegna skaða, skal Jákup Mikkelsen sjálvandi verja málið. At hann er besti málverjin í heimligu kappingini fingu vit enn eitt dømi um so seint sum í gjár, og tað er eingin grund at taka tað næstbesta, tá tað besta er ein møguleiki.

Tí skal Brian Kerr velja tað besta og gera tað við allari virðing fyri hinum báðum málverjunum, tí dystirnir móti Slovenia og Norðurírlandi eru av teimum sera truplu. Og tað er eingin grund til at tveita óroyndu málverjararnar fyri leyvurnar á henda hátt, tá vit hava eitt annað og betri alternativ.

Enn hevur Brian Kerr ikki ament boðað frá, at hann fer at senda boð eftir Jákupi Mikkelsen til dystirnar móti Slovenia og Norðurírlandi, men annað hevði verið undarligt.

Sjálvandi er tað hugstoytt hjá bæði Tórði Thomsen og Meinhardti Joensen, sum hava verið eykamálverjar seinastu árini, um Jákup Mikkelsen verður úttikin. Tað er eitt greitt tekin um, at teir ikki annaðval, men í roynd og veru triðja- og fjórðaval til plássið millum føroysku stengurnar.

Brian Kerr dugir væl at tosa. Spurningurin er nú, hvussu hann fer at greiða frá sínum málmansvalið til næstu landsliðsuppgávurnar – líkamikið hvør verður valdur og vrakaður. Jákup Mikkelsen, Tórður Thomsen, Meinhardt Joensen og føroyski fótbóltsfjepparin bíða spent eftir landsliðsúttøkuni og frágreiðingini aftanfyri.

Míni ráð til landsliðsvenjarin skulu tó vera, at velja landsins bestu leikarar.

*rolant@sosialurin.fo*

# *Miðlarnir skriva...*

*»Ein av hesum støðunum fekk eisini hjálparvenjara okkara, Albert, at siga nøkur myndug, borgarlig orð við dagsins dómara. Tíbetur fekk Albert lopið upp um girðingina og goymt seg onkustaðni, tá dómarin kom rennandi og skuldi reka hann av vøllinum.«*

***• Heimasíðan hjá 07 Vestur um eina hending í landskappingardystinum móti TB***

*»Eg vænti eina rættiliga javna kapping, har ikki bara Stjørnan og Tjaldur, men fleiri onnur lið, fara at stríðast í toppinum, og Kyndil fer at taka stig frá øllum.«*

***• Geir Wardum, venjari hjá kvinnuliðnum hjá Kyndil, á heimasíðuni hjá Kyndli***

*»Hvat gekk so galið í seinna hálvleiki, sum neistakvinnur taptu heili 18-9?«*

***• Heimasíðan hjá Neistanum, sum undrast á avrikið hjá neistakvinnunum í seinna hálvleiki.***

*»B71 slapp við skrekkinum hesaferð og kempaði til tað síðsta. Um vit halda áfram við hesum sama ágrýtni, so eru vit heilt sikkurt aftur at síggja í Vondafonedeildini næsta ár!«*

***• Heimasíðan hjá B71 um heimadystin móti FC Suðuroy***



*Skal Jákup Mikkelsen verja málið hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, nú Gunnar Nielsen er skaddur? Svarið er sára einfalt, sjálvandi skal hann tað!*

*Mynd: Álvur Haraldsen*